Summar PRÁT



# KANSKA ER EYDNAN BARA **AT VERA NØGDUR**

- SUMMARIÐ KANN VERA DRAGANDI OG LÍVSJÁTTANDI, OG VETURIN KANN EGGJA TIL HUGNA OG UMHUGSAN, SIGUR SÓKNARPRESTURIN Í KVÍVÍK, THEODOR ELI OLSEN DAM, SUM Í SÍNUM PRÆDIKUM ONKUNTÍÐ ENDURGEVUR SITAT Á GAJOL-PAKKUM. MIKKJAL Á RYGGI YRKTI, AT EYDNAN ER IKKI AT LÍTA Á, MEN KANSKA ER EYDNAN BARA AT VERA NØGDUR, HELDUR HANN



**SAMRØÐA**
Uni Arge

Theodor Eli Olsen Dam er 33 ára gamal og uppvaksin í Hoyvík. Hann er ungi presturin, sum hvørt leygarkvøld kl. 18.45 lesur Heilaga Evangeliið í útvarpinum. Theodor er væl dámdur prestur, og hann tosar eitt mál, sum øll skilja.

Um onkran av lærusveinunum hevur hann sagt, at hann var hugfarsligur, og tá hann giftir fólk, endurgevur hann gleðiliga U2 og Leonard Cohen, um tað kann gleða brúðarparið.

Stillisliga skemtiligur er hann ofta og haraftrat filosofiskur, og í Summarprátinum hesaferð spyrja vit hann m.a. um veðrið, Jesus, Kierkegaard, tolsemi og friðin í Kvívík, har hann varð innsettur sum prestur í vetur.

**Tú hevur júst verið uttanlands. Mást tú burtur viðhvørt fyri at fylla teg við nýggjari orku?**
Viðhvørt er gott at steðga á, og viðhvørt er gott at síggja, hvussu onnur liva. Men hesaferð fór eg fyrst og fremst avstað fyri at fáa nakrar góðar dagar í summarhúsi í Danmark saman við døttrini og góðum vinfólki. Vit grillaðu, vóru nógv á strondini og vitjaðu eisini Legoland. Veðrið var avbera gott. Gott er at ríða á bylgjum, men eg ásannaði so, at heldur truplari er at ríða á hitabylgju. Tað var øgiliga heitt.

**Fert tú uttanlands eftir heitari veðri, broyting í gerandisdegnum ella fyri at sleppa úr Føroyum?**
Hóast Føroyar sum kunnugt eru punktið, har øll verðin er løgd fyri teym, og har træðrirnir á atlasinum eru surraðir fastir, sum Gunnar Hoydal yrkir, so er gott at síggja, hvussu onnur fólk liva, at víðka sær sjónarringin, sum tað so fínt kallast.

**Verður tú ávirkaður av vetrarmyrkrinum?**
Eg verði ikki tungur av myrkri, og eg kann væl verða ávirkaður positivt av myrku tíðini. Eins og summarið kann vera lívsjáttandi og dragandi, kann veturin vera hugnaligur og eggja til umhugsan innandura. Og eins og tær longu, ljósu næturnar eru tølandi, kunnu eitt nú jólini vera fjálg og sjarmerandi.

**Tekur tú tað tungt, um summarið ikki verður gott?**
Nei, tað ávirkar meg ikki beinleiðis, men eitt gott summar við nógvum sóldøgum er fantastiskt. Ein gáva úr erva bókstaviliga.

**Heldur tú, at fólk í Føroyum eru ávirkað av skiftandi veðrinum?**
Ja, lyndið í føroyinginum er uttan iva merkt av veðrinum. Vit taka tað nógv, sum tað kemur, og vit eru kanska ikki heimsmeistarar í at leggja langtíðarætlanir. Tað liggur uttan iva djúpt í okkum, at veðrið má sær ráða. Hetta er jú "The Land Of Maybe," sum bretsku hermenninir kallaðu Føroyar.

**Umboðar myrkur altíð tað tunga og ljósið tað lætta?**
Tað ger tað helst í fluttum týdningi. Sjálvur fekk eg eitt ørindi at lesa, tá eg varð konfirmeraður, har Jesus sigur, at hann er ljós heimsins. Sama ørindið fekk eg 20 ár seinni frá sama manni, Bjarna Bæk, tá eg varð innsettur sum prestur í Kvívík. Jú, hasin súmbolikkurin hevur nógv at siga fyri meg.

**Lærir tú nógv um menniskju í tínum starvi sum prestur?**
Ja, tað geri eg. Hóast vit øll eru menniskju, so eru vit ikki eins. Men grundkorini eru tey somu, hóast vit enn sum áður ikki standa á sama stigi á samfelagsliga tignarstiganum, og sosialu trupulleikarnir